

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 08 - 2012

# Tvøroyri eisini við á oljumessu

Ikki færri enn fýra føroyskar havnir verða við á oljumessuni ONS í Stavanger í komandi viku. Tær eru Runavíkar, Tórshavnar, Vágs og nú eisini Tvøroyrar havn. Tvøroyri fer at bjóða seg fram við útgerðarstøð bæði við atliti til komandi boringar á føroyska landgrunninum og eisini at sleppa uppí part í nógv økta virkseminum á markinum har bæði Rosebank og Cambo nú fara at verða útbygd. Hetta sigur Pauli Einarsson, býráðslimur, sum er ein av teimum, ið hevur fylgt oljuvinnuni í Føroyum frá byrjan. Hann vísir á, at Tvøroyri liggur stutt frá hesum feltum og henda frástøða saman við góðum tyrlupalli, vinnulívi, raskum sjófólki og einum sera modernaðum sjúkrahúsi, er orsøkin til, at Tvøroyrar Kommuna heldur seg hava góðar møgulleikar saman við við navnframa Danbor Service hjá Mærsk sum partnara at koma uppí frálandavinnuna. At umboða Tvøroyri á ONS verða Pauli Einarsson, Jens Johannesen og hava teir biðið vælkenda oljumannin Johan Mortensen, sum hevur arbeitt fyri eitt nú Hess, Dong og Anadarko um at vera partur av luttøkuni hjá Tvøroyrar Kommunu.